## Ov lítil ES-kunning

Tað er ikki avgerandi fyr tilveruna hjá Evropasamveldinum, at Ísland gerst limur har, og Ísland kann ivaleyst eisini klára seg uttan fyri samveldið. Men spurningurin er, um tættari samstarv partanna millum hevði gagnað báðum. Tað segði ES-sendimaðurin í Íslandi, finnlendingurin Timo Summa, í gjár. Hann helt tað vera umráðandi, at íslendingar verða kunnaðir um ES og møguligan limaskap og nevndi, at tá Finnland søkti um limaskap, fingu bæði viðhaldsfólk og andstøðufólk pening frá stjórnini til upplýsandi virksemi.



## Stríð um loysigjald

USA vil A.P. Møller-Mærsk og hini stóru reiðaríini í heiminum at gevast við at rinda somaliskum sjórænarum pengar sum loysigjald fyri rænd skip. Orsøkin er, at sambært amerikanarunum fær tann tiltikni somaliski yvirgangsfelagsskapurin al-Shabaab ein part av teimum 500 milliónum krónunum, sum verða goldnar í loysigjaldi um árið. Danska reiðarafelagið er ímóti amerikanska kravinum. Felagið sigur við Berlingske Tidende, at tað er neyðugt við loysigjaldi fyri at tryggja skip og manningar.

# Reglurnar eru greiðar

**Treytirnar fyri at krabbameinssjúklingur fær fylgjara við, eru rættiliga strangar. Ikki minst eftir at tær vóru herdar í fjør**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hin 3. juli 2009 vóru strangari leiðreglur settar fyri, nær fylgjari kann ávísast at fara við sjúklinginum settar í verk. Hetta hevur eisini fingið talið av avvarðandi munandi niður.

Í leiðreglunum fyri, nær fylgjarar kunnu ávísast við sjúklingum uttanlands, stendur, í § 7, stk 2 at: "Gera heilt serlig viðurskifti seg galdandi, kann sjúkrahúsverkið bera ferðaútreiðslurnar, so ein persónur kann verða ávístur at fara við sjúklinginum sum fylgjari. Yvirlæknin tekur avgerð um møguligan fylgjara".

Í sambandi við "heilt serlig viðurskifti" er høvuðsreglan, at yvirlækni kann ávísa fylgjara við sjúklinginum, har heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi, tá talan er um sjúklingar við lívshóttandi sjúku, ið bráðfeingis verða ávístur til viðgerð uttanlands.

Yvirlækni kann harumframt í ávísan mun ávísa fylgjara til sjúklingar, sum vegna høgan aldur, sálarliga sjúku ella ringt avlamni als ongan møguleika hava at ferðast og uppihalda seg einsamallar uttanlands, og har tað ikki er møguligt at stíla fyri praktiskari hjálp til hesar sjúklingar á staðnum.

Her verður eisini tilskilað, at viðurskifti hjá sjúklingum, ið IKKI eru at rokna sum "heilt serlig viðurskifti" eitt nú fevna um:

Afturvendandi kontrolvitjanir, har ikki kann roknast við, at sjúklingurin fær ring/verri boð viðvíkjandi útlitum fyri lívi ella førleika.

Krabbameinssjúklingar, sum ferðast til kontrollvitjanir.

Krabbameinssjúklingar, ið ferðast til cytostatikaviðgerð (kemoviðgerð), sum ikki kann gevast í Føroyum, og har hjáárin ikki væntast fyrrenn eftir heimkomuna til Føroyar.

Eisini verður greitt frá, at støður sum: Ótti fyri at flúgva, trupulleikar við at finna í Keypmannahavn ella øðrum býum uttanlands, trupult at bera nógv viðføri og líknandi eru heldur ikki at rokna sum heilt serlig viðurskifti. Í hesum føri ber til dømis til at stíla fyri praktiskari hjálp á staðnum.

Sostatt skal rættiliga nógv til, fyrr enn krabbameinssjúklingur eigur at fáa ávístan fylgjara við sær.

## Munur á fólki?

JÓNA MORTENSEN



Eri fyri stuttum komin heim aftur á klettarnar. Eg havi verið til stráluviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum búði í tí sambandi á Hotel Torshavn í næstan sek vikur.

Áðrenn stráluviðgerðinar var eg niðri fýra fer fyrst til skurðviðgerð og síðani til kemoviðgerð Hetta skal nú ikki verða nøkur lívssøga. Tað eg ... við, er, at tað er sera óheppið, at ...rahúsið ger mun á fólki, tá tað snýr ... við til Danmarkar. Eg fekk at ...i niður, at eg vegna ... eg sl...

*Í lesarabrævi í blaðnum í gjár, filtist Jóna Mortensen á viðferðina hon hevur fingið sum krabbameinssjúklingur*

| Talva 2: Sjúklingar og fylgjarar jan-okt 2009. Sjúklingaferðir úr Føroyum. | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2009** | **jan** | **feb** | **mar** | **apr** | **mai** | **jun** | **jul** | **aug** | **sep** | **okt** | **Jan-Okt 2009** |
| **Sjúklingaferðir** | **239** | **220** | **255** | **214** | **207** | **254** | **157** | **229** | **245** | **208** | **2228** |
| **Fylgjarar** | **195** | **171** | **218** | **178** | **164** | **216** | **121** | **174** | **144** | **133** | **1714** |
| Avvarðandi | 182 | 162 | 190 | 159 | 146 | 201 | 107 | 159 | 128 | 117 | 1551 |
| Heilsustarvsfólk | 13 | 9 | 28 | 19 | 18 | 15 | 14 | 15 | 16 | 16 | 163 |
| **Ferðandi íalt** | **434** | **391** | **473** | **392** | **371** | **470** | **278** | **403** | **389** | **341** | **3942** |
| % Fylgj./Sjúkl. | 0,82 | 0,78 | 0,85 | 0,83 | 0,79 | 0,85 | 0,77 | 0,76 | 0,59 | 0,64 | 0,77 |
| % Avvarð./Sjúkl. | 0,76 | 0,74 | 0,75 | 0,74 | 0,71 | 0,79 | 0,68 | 0,69 | 0,52 | 0,56 | 0,70 |
| Kelda: Sjúklingaskrivstovurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum | | | | | | | | | | | |

*Hin 3. juli 2009 vóru strangari leiðreglur settar fyri, nær fylgjari kann ávísast at fara við sjúklinginum settar í verk. Hetta hevur eisini fingið talið av avvarðandi munandi niður. Hetta sæst í einum uppriti, sum Heilsumálaráðið sendi Fíggjarnevnd Løgtingsins 19. november 2009*



*Aksel V. Johannesen fer nú at minna yvirlæknarnar á leiðreglurnar, so fólk ikki eru fyri órætti*

# Øll skulu verða eins viðfarin

**Landsstýrismaðurin fer nú at minna tey trý sjúkrahúsini og teir 30 yvirlæknarnir um leiðreglurnar fyri at fáa fylgjara við til sjúkraørindi uttanlands**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Aksel V. Johannesen, sigur við Sosialin, at hann fer at senda eina áminning út á øll sjúkrahúsini, so sjúklingar ikki verða fyri órætti. Sambært honum, eru reglurnar púra greiðar.

– Tað eru yvir 30 yvirlæknar, sum ávísa sjúklingar av landinum. Læknarnir eru bara menniskju, so sjálvandi kann vera munur á, hvussu teir umsita og tulka reglurnar, sigur landsstýrismaðurin, sum heldur tað vera óheppið, um fólk kenna seg illa viðfarin. Tí, sum hann sigur: Tað er umráðandi, at øll verða líka viðfarin.

Landsstýrismaðurin vísir á, at til ber at kæra eina avgerð. Men tað hendir ikki so ofta. Men samstundis skilur hann, at tey, sum hava fingið fylgjara, sjálvandi ikki kæra sína neyð. Tí verða tað bara tey, sum ongan fingu, sum verða at finna í kæruskipanini.

– So tað einasta eg kann gera er at fylgja málinum upp, so læknarnir umsita reglurnar meira eins, sigur landsstýrismaðurin, sum ikki hevur ætlanir um at ganga ynskinum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á møti, um at øll áttu at fingið tilboð um fylgjara.

– Sum støðan er í landinum, er tað trupult at fáa pengarnar at røkka til serviðgerð uttanlandst. Tað hevði snøgt sagt verið alt ov kostnaðarmikið, sigur hann.